# Stuðul veittur úr grunninum Aberdeen - Tórshavn

TÍÐINDASKRIV
*Tórshavnar Kommuna*

Grunnurin Aberdeen - Tórshavn játtaði í farnu viku tilsamans 102.000 kr. til seks føroyskar umsøkjarar.

12 umsøkjarar høvdu søkt um stuðul úr Grunninum Aberdeen - Tórshavn, seks føroyskir umsøkjarar og seks skotskir. Grunnurin hevði gott 200.000 kr. at luta millum umsøkjararnar, og av hesum vóru 102.000 kr. játtaðar til teir seks føroysku umsøkjararnar.

Lærararnir í enskum á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, fingu 15.000 kr. til námsferð til Aberdeen.

Tórshavnar Ungdómsharmoniorkestur, fekk 30.000 kr. til ferð til Aberdeen.

GHM, fingu 25.000 kr. til arbeiðið við at menna tónlistarliga samstarvið millum Tórshavn og Aberdeen.

Føroya Studentaskúli og HF-skeið, fekk 11.000 kr. til námsferð í samband við verkætlan um oljuvinnuna.

Tórshavnar kommunuskúli, fekk 14.000 kr. til ferðir til Aberdeen í samband við eina listarverkætlan í Aberdeen.

Foreldrabólkur sum skipar fyri dansi og frálæru í dansi í einum alkoholfríum umhvørvi, fekk 7.000 kr.

Fundurin í samstarvsbólkinum varð hildin í Norðurlandahúsinum hósdagin, í sambandi við skotsku vikuna í Tórshavnar kommunu.







# Vit hava altíð okkara serstøðu



*Her er uttanlandsnevndin á tiltikna vígvøllinum, Waterloo. Uttanlandsnevndin er júst afturkomin av í ferð í Brússell*

Í samrøðuni við Hergeir Nielsen í Sosialinum fríggjadagin er eitt brot dottið burturúr ímillum.

Einastaðni stendur, at "Tað hevur verið sagt við hvørt, at fer Noreg uppí ES, hava vit í veruleikanum onki"

Sum sæst, er ongin endi á setninginum.

Tað skuldi standa, at "Tað hevur verið sagt við hvørt, at fer Noreg uppí ES, hava vit í veruleikanum onki val, tí tað koma vit at vera eftirbátar á fiskamarknaðinum í ES"

Svarið frá Hergeir Nielsen skuldi vera, at hesum er hann ikki samdur í. Hann sigur, at sjálvsagt hava vit altíð eitt val og vit eiga altíð at taka støðu út frá okkara egnu støðu. Tað er eisini munur á at hava fiskivinnuna sum eina hjávinnu, eins og hon er í Noregi og at hava hana sum eina alt avgerandi høvuðsvinnu,sum hon er í Føroyum og tí hava vit onnur atlit at taka, enn Noreg hevur.

Fer Noreg upp ú, setir tað okkara marknaðarviðurskifti í eitt annað ljós, men tað merkir ikki, at einasta rætta er at fara upp í ES, tí tað siga vit eisini frá okkum ræðið yvir okkara fiskitilfeingi.

Hergeir Nielsen nevnir eisini, at tað er ikki heilt rætt at brúka vendingina, at føroyingar skulu melda seg inn í ES ella ikki.

– Tað eru bara sjálvstøðug lond, sum kunnu melda seg inn. Hjá okkum skal bara ein setningur í danska sáttmálanum broytast, so eru vit limur í ES, sigur hann.

Á myndini er uttanlandsnevndin avmyndað á tiltikna vígvøllinum, Waterloo. Waterloo liggur uttan fyri Bruxelles, har Wellington og Blucher gjørdu enda á Napoleon og fronsku stórveldisdreymunum sunnudagin 18. juni 1815.

Seinasta sunnudag vitjaï føroyska uttanlandsnevndin vígvøllin saman við føroyska sendiharrarnum, Hákuni Djurhuus.






